## Jón Rói er fastur maður

Jón Rói Jacobsen spældi allar 90 minuttirnar, tá AaB í gjárkvøldið spældi 1-1 javnleik móti meistarunum úr FCK. Føroyski miðverjin fekk nakrar dystir móti kappingarenda í vár, og nú tykist hann veruliga hava bitið seg fastan millum teir fyrstu 11 hjá venjaranum. AaB levði seg á odda tíðliga í seinna hálvleiki vi máli frá Siyabonga Nomvethe, men eitt korter fyri leiklok javnaði Brede Hageland fyri FCK. Súni Olsen kom á vøllin seinasta lítla korterið.



## Buffon spælir til 2018

Italski landsliðsmálverjin hevur í fleiri ár verið mettur sum ein tann besti í heiminum. Og sambært Gianluigi Buffon sjálvum, so vil hann halda sær á toppinum í nógv ár afturat. Í øllum førum sigur hann nú, at eitt av hansara málum er, at hann eisini vil verja italska málið í HM-kappingini í 2018. Megnar hann tað, so ger hann eisini Dino Zoff kynstrið eftir. Zoff var í nógv ár trúfastur móti Juventus, har Buffon spælir, og hann var 40 ára gamal, tá hann var við til at vinna HM í 1982. Og hagtølini siga, at Italia er við í HM-finaluni hvørt 12. ár, so ætlanin hjá Buffon tykist ikki ógjørlig.

HB-FH 0-0:

# Fyrsta stigið á árinum

**Spenningur var ongan tíð um samlaða útfallið. Men við javnleikinum vann HB fyrsta altjóða stigið í ár til Føroyar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Setningarnir hjá HB vóru tvinnir undan dystinum móti FH. Fyrst og fremst, so skuldu føroyameistararnir prógva fyri bæði sær sjálvum og viðhaldsfólkum sínum, at dygga 4-1 tapið í Íslandi ikki veruliga var tað, sum var munurin millum HB og FH. Og hetta skuldi gerast við at betra um verjupartin, sum hevur fingið dyggar ákoyringar í ár.

Og sum so vórðu bæði málini rokkin. Málleysi javnleikurin var ongan tíð nóg mikið til at skapa nakran spenning um úrslitið, men tað var nú eisini nakað, sum HB-liðið var avklárað um, áðrenn dysturin byrjaði. Og tí kundu teir sum so spæla dystin uttan nervar av nøkrum sum helst slag.

### Uppreisn

Hóast talan ikki gjørdist um sigur, so var avrikið ivaleystað higartil besta í ár hjá føroyskum liðum í Evropa. Ikki bara tí HB við hesum vann fyrsta føroyska stigið á árinum til føroyskan fótbólt. Men eisini tí havnarmenninir við eitt sindur av hepni kundu vunnið dystin.

Kanska vóru teir hjá FH ikki so altráðir at vinna dystin, sum teir vóru fyrstu 90 minuttirnar í Íslandi. Men teir fingu so heldur ikki serliga góðar sømdir. Sum skilst, so var tað ein trupulleiki hjá HB í fyrra dystinum, at teir ikki fingu stongt fyri á kantunum. Men tann parturin eydnaðist avbera væl á Tórsvølli, har tað var rár hending, at teir hjá FH komu at baklinjuni.

HB hevði sum heldur ikki teir heilt opnu møguleikarnar, men í tveimum stóðu ávikavist Milan Kuljic og Emil N. Leifsson sera væl fyri, uttan at nakað tó spurdist burtur úr teimum royndunum heldur.

### Evropa bíðar

Hvussu var og ikki, so var talan um eitt slag av uppreisn fyri HB. Teir fingu í øllum førum prógvað, at liðið er betri, enn tey 4-1 í Íslandi vístu, og hóast næsta milliónin frá UEFA ongan tíð kom serliga nær, so man avrikið á Tórsvølli hava gitið stríðsviljan hjá liðnum eitt skump rætta vegin.

Tí tað kann væl verða, at talan ikki verður um nakran Champions League undankappingardyst hjá HB komandi ár. Men tað skal vera løgið, um teir reyð/svørtu í Gundadali ikki aftur medda eftir evropiskum fótbólti av onkrum slag. Fyrsta møguleikan til hetta fáa teir í august mánaði, tá steypafinalan móti EB/Streymi verður á skránni.

**HB - FH 0-0 (0-0)**
**Dómari**: Petter Kari (Finland)
**HB**: Tróndur Vatnhamar - Mortan úr Hørg, Hans á Lag, Rasmus Nolsøe, Tór-Ingar Akselsen - Ólavur í Ólavsstovu (Poul Thomas Dam, 82.), Kári Nielsen, Rógvi Jacobsen, Milan Kulic, Rókur av Fløtum Jespersen (Emil Nolsøe Leifsson, 82.), Andrew av Fløtum (Páll M. Joensen, 76.)
Gult kort: Hans á Lag, Andrew av Fløtum
**FH**: Daði Lárusson - Guðmundur Sævarsson, Sverrir Garðarsson, Tommy Fredsgaard Nielsen (Auðun Helgason, 80.), Freyr Bjarnason - Matthías Guðmundsson, Dennis Michael Siim, Davíð Viðarsson, Tryggvi Guðmundsson (Atli Guðnason, 79.) - Sigurvin Ólafsson (Ásgeir Gunnar Ásgeirsson, 70.), Matthías Vilhjálmsson
**Gult kort**: Dennis Michael Siim



*Tað eydnaðist hesa ferð hjá HB-miðvøllinum at steingja kantarnar. Og við eitt lítið sindur av hepni kundi eitt nú Milan Kuljic eisini havt avgjørt dystin til fyrimuns fyri føroyameistararnar*
*savnsmynd*

# Iðra okkum um fyrra dystin

Hóast teir hjá HB kundu vera so hampuliga væl nøgdir um avrikið á Tórsvølli mikukvøldið, so kundi málverjin, Tróndur Vatnhamar, tó ikki lata vera við at iðra seg.

Hatta var nokk okey. Og fyri meg er tað sjálvandi gott, at nullið verður hildið í einum evropiskum dysti.

Men út frá fyrra dystinum hava vit alla orsøk at iðra okkum. Hatta liðið var ikki somikið gott, at vit skuldu tapt 4-1 í Íslandi. Og var støðan kanska 2-1 til teir, áðrenn vit fóru á vøllin í dag, so ivist eg ikki, at vit høvdu kunna rokkið einum samlaðum sigri. Sjálvandi kann tað vera, at teir ikki tóku sær ov stórar lutir fyri, nú teir vunnu so trygt á heimavølli. Men hjá okkum vantaði eisini seinasta tendringin, tí tú veitst jú undan dystinum, at møguleikin at koma víðari er burtur, heldur Tróndur.

**-mørk**

